# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


***Skrásetingar nr.:***

**L-E012-7**

# Leiðbeining um útflýgging, goymslu, handfaring og persónligari verndarútgerð í samband við eiturevni.

**1.1** Eftir umsókn, útskrivar Arbeiðseftirlitið útflýggingarloyvi til keyp av eiturevnum og ávísum øðrum kemiskum evnum til tekniska nýtslu. Umsóknin skal skrivast á oyðublað, ið fæst frá Arbeiðseftirlitinum, og skal hetta verða dagfest og undirskrivað av ábyrgdarfólkinum.

**1.2** Loyvið er treytað av, at felag ella persónur, ið fær útflýggja hetta evni, heldur galdandi reglur, viðvíkjandi goymslu, handfaring og persónligari verndarútgerð, og má evnið bert nýtast til tekniskt endamál, og ikki til medisinska viðgerð.

## *2. Goymslur.*

**2.1** Eiturevni skal goymast undir lási, sum bert kann opnast við lykli, sum ábyrgdarfólkið altíð hevur uppi á sær.

**2.2** Hurðin til rúmið ella skápið, ið verður nýtt til hetta endamál, skal hava týðiliga merking, sum sigur, at eiturevni verður goymt her.

**2.3** Tá kravt verður, at eiturevni skal goymast undir lási, verður eisini hugsað um, at børn skulu ikki hava atgongd til evni.

## *3. Handfaring.*

**3.1** Til heilsuskaðilig evni og tilfar, skal latast ein góðkend brúkaraleiðbeining á føroyskum ella donskum máli.

**3.2** Útvegarin av evnum og tilfari hevur skyldu til at geva allar neyðugar upplýsingar, sum skulu til fyri at arbeiðið kann gerast so vandaleyst, sum í roynd og veru er gjørligt.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 uma rbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 25. august 1983.
Kunngerð nr. K-A005-1 um arbeiðsklæðir og persónliga verndarútgerð frá 4. september 1995
Kunngerð nr. K-E012-3 um flokking, innballing, merking, sølu og goymslu av vandamiklum evnum og tilfari frá 20. sept. 1990.


| ***Útgivið fyrstu ferð:*** | ***Seinastu broytingar:*** |
| --- | --- |
| **7. mai 1986** | **25. januar 1996** |

**3.3** Alt evni og tilfar, sum kemur undir ásetta vandaheiti, skal verða týðiliga merkt eftir reglunum við vanda- og trygdarsetningum og hava fyriskrivað vandamerki. Evnið má ikki latast í annað ílat, sum ikki hevur somu merking.




***4. Persónlig verndarútgerð.***

**4.1** Um arbeiðið við evni og tilfari ikki kann leggjast soleiðis tilrættis, at tað kann fara fram á ein tryggan og heilsugóðan hátt, skulu persónlig verndarútgerð og/ella serlig arbeiðsklæðir nýtast.

**4.2** Sambært kunngerð nr. 74 frá 25. okt. 1985, ber arbeiðsgevarin allar útreiðslur til arbeiðsklæðir og persónliga verndarútgerð.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, tann 2. oktober 1991

Eli Davidsen, stjóri (sign.)